# Stórur áhugi fyri vinnudegi

**Eysturoyar Vinnulívsfelag skipaði í gjárkvøldið fyri vinnudegi í Mentanarhúsinum í Runavík, har umleið 120 fólk frá vinnuni í Eysturoy tóku lut**


*Ársfundurin hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag varð hildin í auditoriinum í nýggja mentanarhúsinum/skúlanum í Runavík*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

VINNUDAGUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var Rodmundur Nielsen, formaður, sum vegna Eysturoyar Vinnulívsfelag bjóðaði stóru mannfjøldini vælkomnari til kvøldið, sum í høvuðsheitinum snaraði um tríggjar sera áhugaverdar fyrilestrar.

Felagið hevur ikki so nógv ár á baki, og hevur í eina tíð heldur ikki verið so ógvuliga aktivt, men tað skal nú bøtast um. Felagið er farið undir sonevndar »far heim« fundir, sum skulu haldast regluliga einaferð um ársfjórðingin. Tann fyrsti av sínum slag var fyri fjúrtan døgum síðani í Tavuni í Leirvík. Síðani er ætlanin at taka hesar fundir upp aftur í september, og ferðast skal runt í oynni við hesum fundum.

Nevndin hevði fingið Gunvør Balle, føroyska sendikvinnu í Reykjavík, at greiða frá støðuni í Íslandi, og var hetta ein sera áhugaverdur og upplýsandi fyrilestur, sum fór víða um, eins og hann eisini fór í dýpdina.

Síðani helt Jóhan Dahl, vinnumálaráðharri, fyrilestur um vinnumøguleikar og karmarnar, sum politisku myndugleikarnir seta. Hann nevndi eisini summi ynski, ið hann sum vinnumálaráðharri kundi hugsa sær at sett í verk og nevndi tað arbeiði, ið liggur fyri framman viðvíkjandi raðfestingum, tá fíggjarlógin fyri komandi ár kemur fyri.

Triði fyrilestrarhaldarin var Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum. Hon viðgjørdi vinnulívið við atliti til kreppuna, sum valdar. Hon nevndi, hvat ið ansast skuldi eftir ikki at gera í hesum krepputíðum, og eisini, hvat er skilagott at gera.

Vit fara at venda aftur til ársfundin hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag í Vinnusíðunum í blaðnum týsdagin.

Eisini verða samrøður við Gunvør Balle, føroyska sendikvinnu í Reykjavík, og Maritu Rasmussen, stjóra í Vinnuhúsinum, í vinnurásini týsdagin.




BERG MOTORS
Staravegur 1-3 · Postboks 1039 · 110 Tórshavn
Tel: 31 35 35 · info@bm.fo · www.bergmotors.fo

Vit hava fingið fatur í 10 Suzuki Liana afturat, sum vit selja fyri bert 129.990,- krónur.

Bilarnir eru væl útgjørdir og hava m.a. hitaði forsetur, hitaði síðuspegl, aircondition, fjarðstýrt sentrallás, radio við fløguspælara, ið kann stýrast frá róðrinum, el-rútar aftan og framman o.a.

Bilarnir hava 3 ára garanti.

SUZUKI